## Lisberg Band á Skarv

Leygarkvøldið verður nógvur tónleikur á Skarv Mr. Blues Uni Reinert Debess og Brandur Jacobsen trummusláari úr bluesbólkinum hjá Una, Crawling Blue, fara saman at spæla ymiskt gott. Síðan fer Høgni Lisberg Band á pallin. Teir spæla seg heitar á Skarv, áðrenn teir fara á Roskilde Festivalin. Høgni við bólki sigur seg vera svangan eftir at spæla. Hann arbeiðir við nýggjum tilfarið, og fer at framføra nøkur av nýggju løgunum á Skarv. Livandi tónleikurin leygarkvøldið á Skarv byrjar um miðnáttarleitið.



## Skógareldur í Athen

Herviligur skógareldur herjar í hesum døgum í grikska høvuðsstaðnum, Athen. Allir sløkkiliðsmenn í landinum, heili 15.000 í tali, eru settir at ansa eftir eldinum, sum hevur stóran møguleika at útbreiða seg. Eldurin er júst nú 30 kilometrar norðanfyri Athen, men yvir 30 metrar høg brennandi trøð økja vandan fyri at eldurin kemur at nærkast býnum. Hitabylgja er í hesum døgum í Athen, og við sínum fleiri enn 40 hitastigum er hetta helst atvoldin til stóra eldin.

# Móðirloysingur gjørdist

**Sum skipari og ein av undangongumonnunum innan føroyska kraftblokkaveiði og løgtingsmaður í samfull 23 ár, er Henrik Old kendur millum allar føroyingar. Men tað eru ikki øll, sum vita, at fryntligi skiparin og politikarin gjørdist móðirloysingur longu, tá hann varð føddur. Mamman doyði í barsilssong 29 ára gomul, og Henrik varð kallaður upp eftir henni**

SAMRØÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Henrik Old sær ikki út til at fylla seksti ár, her hann situr – mettur og væl settur – á Simmer Dim matstovuni umborð á Norrønu á veg til Scrabster*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Sosialurin hitti Henrik Old, tá hann og konan, Elsebeth, vóru á veg til Scrabster á fyrstu almennu ferðini hjá Norrønu hagar mánadagin, 18. juni.

At hann fylti seksti tveir dagar seinni, vistu vit einki um, og tað sást heldur ikki á honum. Henrik tók ikki føðingardagin upp á tungu.

### Øll fýra

– Vit hava bil við og koyra sjálvi. Teir fyrstu dagarnar fara vit at gista, har tað passar okkum best. Í vikuskiftinum koma báðar døturnar til Aberdeen í flogfari úr Keypmannahavn, og tá fara vit fýra í karavan at verða saman við teimum. Umstøðurnar í karavanunum eru góðar og umhvørvið, har hesar bygdir eru, er hugnaligt við øllum hentleikum og nógvum ymiskum møguleikum.

Jenny og Inga, sum døturnar eita, ætlaðu sær heimaftur við Norrønu saman við teimum báðum "gomlu".

### Doyði barsilssong

Sum skipari og ein av undangongumonnunum innan føroyska kraftblokkaveiði umborð á Nýborg og løgtingsmaður í samfull 23 ár, er Henrik Old kendur millum allar føroyingar.

Tað, sum mong ikki vistu um mannin, er, at hann gjørdist móðirloysingur longu, tá hann varð føddur. Mamman, sum kallaðist Henrikka, doyði barsilssong, og tí varð Henrik uppkallaður eftir henni.

Pápin var bretin, Dennis William Connor Old.

Henrik sigur, at mamman og pápin giftust í 1946, og tá mamman doyði, var hon bert 29 ára gomul.

– Pápi flutti aftur til Onglands, og har fekk hann sína egnu familju. Eg fekk soleiðis tríggjar hálvbrøður í Bretlandi.

Sjálvur vaks Henrik upp hjá mostur síni og manni hennara, og har hevði hann tað gott.

– Pápi doyði í 1970, men omman mín gjørdist ógvuliga gomul, 94 ár. Hon yvirlivdi øll síni børn. Eg vitjaði hana fýra ferðir.

### Góðir kenningar

Sum skipari kom Henrik nógv til Skotlands at landa, ikki minst til Aberdeen og Peterhead, og eins og aðrir føroyingar kom hann at kenna skotar, teirra vinsælu, blíðskap og trúskap.

– Tá skotar siga ja, kanst tú líta á, at teir halda orð, og hevur tú brúk fyri teirra hjálp, ført tú hana, sigur Henrik.

Skipið Lunar Bow, sum vágbingar í sínari tíð keyptu úr Skotlandi, skapti eitt áralangt samband millum vágbingar og teir, ið seldu skipið. Hetta samband er hildið við líka upp ígjøgnum árini.

– Vágbingar og aðrir komu at kenna hesar menn í Peterhead, og í dag eru tað abbasynir hjá tí gamla, sum bera førningin fram á leið.

### Gamal siður

Henrik rósar hesari familju og hesum monnum fyri teirra virknað starv á sjónum og í vinnuni á landi.

– Hetta eru stabilir og óføra dugnaligir og raskir menn. Eg minnist, tá hin gamli plagdi at koma oman á bryggjuna, og vit vóru eisini inni á gólvinum á frystivirkinum, sum teir høvdu.

Hann sigur, at føroyingar soleiðis hava havt nógv sam-